Hvat er tað

Hvat er tað, sum á jólum teg man frøa,
ger fjálga lon, kann harða hjarta grøða?
er alt um fjós og krubbu jólanátt
eitt einki, tá ið stjørnan kámast brátt?
Nei, stjørnan lýsir bjørt, tá eyga sær tað barn
í krubbu, alt er vorðið mær.

Er jólaboð alt gávur upp í leypar,
bert fagurt ljós og ovurfyltir steypar?
Er heimsins og familju friðarstund,
bert vápnahvíld við jólunum á fund?
Nei, stjørnan lýsir bjørt, tá eyga sær tað barn
í krubbu, alt er vorðið mær.

Er stjørnan bert til prýðis, kertur bjørtu,
og flættar tú tey sonnu jólahjørtu?
Slapp Gud at tendra ljós í tær og mær,
og letur tú ta stjørnu lýsa tær?
Ja, stjørnan lýsir bjørt, tá eyga sær tað barn
í krubbu, alt er vorðið mær.

Orð: Svend Erik Petersen Lag: Peter Sander Andersen
Týtt: Edmund Williamson